**Skipaeftirlitið**
*Faroese Maritime Authority*
*Ministry of Fishery and Maritime Affairs*

# Starv sum løgfrøðingur á Skipaeftirlitinum

Skipaeftirlitið søkir eftir einum løgfrøðingi til setan skjótast gjørligt.

Arbeiðsøki hjá Skipaeftirlitinum er fyrisiting og eftirlit við heilsu, umhvørvi og trygd á føroyskum skipum.

Skipaeftirlitið er í holt við at gera egnan portal á internetinum, har alt tað tekniska regluverkið, Skipaeftirlitið arbeiðir eftir, verður lýst sum Fráboðanir frá Skipaeftirlitinum. Fyrisitingarligu uppgávurnar umfata eisini samskifti og samstarv við vinnulívið, útlendskar fyrisitingar og við altjóða- og millumtjóða felagsskapir. Føroyar hava atlimaskap í sjóvinnufelagsskapinum hjá ST, International Maritime Organisation (IMO) og møtir á fundum har. Skipaeftirlitið og føroysk sjóvinna verður ávirkað av næstan øllum avgerðum, ið verða tiknar í IMO. Arbeiðið í IMO verður samskipað í samráð við sendistovuna í London. Aðrir altjóða felagsskapir, ið viðgera sjóvinnu eru eitt nú International Labour Organisation (ILO), Organisation for Economic Co-ordination and Development (OECD), United Nations Conference on Trade and Development (UNCTAD) og aðrir.

Samstarvspartar hjá Skipaeftirlitinum er fyrst og fremst alt tað maritima umhvørvi í Føroyum, men eisini í størri og minni mun maritimir bólkar runt um allan heimin. Sjóvinna er ein fullkomiliga globalur ídnaður.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið umfatar m.a. hesar upppgávur:**
- at fyrireika lýsing av reglum fyri skip í Fráboðanum frá Skipaeftirlitinum, soleiðis at tær samsvara við altjóða ásetingar
- fyrisiting og eftirlit við føroyskari lóggávu innan sjóvinnu, soleiðis at hon er í samsvari við altjóða lóggávu
- samskifti við vinnulívið
- samskifti við altjóða felagsskapir ið fáast við sjóvinnu, eitt nú IMO
- ráðgeving í fyrisitingarligum spurningum

**Førleikakrøv:**
- til starvið krevst útbúgving sum løgfrøðingur
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- kunnleiki og royndir innan sjóvinnu kunnu verða ein fyrimunur fyri at verða settur í starv, men ikki ein treyt.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan arbeiðsøkið.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar og Løgfrøðingafelag landsins. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 31. august 2004, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
Postsmoga 26 · 370 Miðvágur

Meiri fæst at vita um starvið frá deildarstjóranum á Skipaeftirlitinum Óla Hans Hammer Olsen, á tlf. 355600.

**SKIPAEFTIRLITIÐ**
**POSTSMOGA 26 · 370 MIÐVÁGUR**
**Telefon 355600 · Telefax · 355601 · E-mail: fma@fma.fo**

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin við Løgmannabreyt**
Á stovninum eru tvær vøggustovur við 12 børnum í hvørjari, og tvær barnagarðsstovur við 21 børnum í hvørjari. Fýra starvsfólk eru í hvørjari stovu.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagstovnin við Løgmannabreyt eftir:**
- einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 20. september 2004 ella eftir nærri avtalu. Viðkomandi, ið settur verður kemur at arbeiða saman við einum pedagogi og tveimum hjálparfólkum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sofíu Nattestad, stovnsleiðara, tlf. 319105 / 219105.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum við Løgmannabreyt, Boks 3027, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi **mánadagin 13. september 2004.**

---

Forkunnugt ***vísindaligt*** seminar um
**Trúgv og heilsu & Kristin undurverk**

Granskingarúrslit um sambandið millum trúgv og heilsu verða løgd fram.

- Hvussu nógv hevur heilsa við trúgv at gera?
- Síggja læknavísindin og teologiin ikki verðina við heilt hvør sínum eygum?
- Kunnu hesar vísindir yvirhøvur sameinast?
- Nær er eitt undurverk eitt undurverk?

**Leygardagin 25. september kl. 13.00-16.30 á Hotel Føroyum**

Kostnaður: kr. 575,- v/mvg. íroknað kaffi og køku

**Tilmelding innan 1. sept. á: www.synergi.fo - tel 227464 - 225462**

Synergi
Meira um tiltøkini á **www.synergi.fo**
tel 227464/225462

team85

---

**DVEYLAN**
**Gólv- og vegg vask**



- **Vinyl**
- **Linolium**
- **Flísar**
- **Teppir**
- **Veggir**

**J.C. Svabosgøta 50**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 31 41 75**

---

# Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

### Grundskeið fyri fosturforeldur

**17.-19. september**
**og 22.-24. oktober**

Skeiðið verður í tveimum umførum á 3 dagar

| | |
|---|---|
| fríggjadag og leygardag | frá kl. 9.00-19.30 |
| sunnudag | frá kl. 9.00-16.00 |

**Innihald:**
- Vitan um hvussu børn mennast
- Menna førleikan at skilja signal, ið børn geva
- At økja kenslusemi og fatanina fyri korunum hjá børnum, ið eru til fosturs
- Ogna sær vitan um supervisión sum mennandi arbeiðsháttt
- Læra at skilja serligu korini hjá útsettum børnum viðvíkjandi læring
- Ogna sær vitan um og læra at skilja korini hjá foreldrum
- Gerast greið yvir egna styrki og veikleikar
- Ogna sær førleika at umrøða og arbeiða við støði í virkisætlanum

**Lærarar:**
Uffe Vester Nielsen lektor í sosialfag
Jesper Munksgaard lektor í pedagogik

Skeiðið verður hildið í hølum Starvsmannafelagsins í J. H. Schrøtersgøtu 9.

Kostnaður 800 kr.

Tilmelding innan 10. september á tlf. 31 77 55 mánadag-hósdag millum kl. 15.30 og 19.00.

---

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



frá leygardagnum 28. aug.
allar útsøluvørur
**-50%**
PIFF · PAFF · PUFF

---

**VARPIÐ**
**Skráir og ummælir**
**16 síður**
**Hvønn fríggjadag**

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

---



**Skeiðsdepilin**
FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN

## GRUNDLEGGJANDI MEISTARAÚTBÚGVING

***Arbeiðið liðugt til tíðina! - hvussu?***
***Er samsvar millum arbeiðsorku og inntøku hjá tær?***
***Kunnu tær fyrisitingarligu uppgávurnar minkað og gerast meira áhugaverdar?***
***Hvat er MVG, arbeiðsmarknaðargjøld, og hvat er ein hóskandi tímaløn?***
***Hvør er marknaðurin, og hvussu taka vit okkum best av kundunum?***
***Hesar og nógv fleiri spurningar kanst tú fáa svar uppá á skeiðnum!***

**Málbólkur**
Skeiðið er fyri handverkarar, sum ganga við ætlan um at byrja egið virki og fyri teimum, ið eru komin í gongd, men vilja vita meira um virkisrakstur. Endamálið er at geva luttakurunum innlit í ymiskt, sum kann hjálpa teimum at reka eitt sunt og lønandi virki.

| | |
|---|---|
| **Innihald** | · Virkisætlan - Fíggjarviðurskifti<br>· Sáttmála- og starvsfólkaviðurskifti<br>· Marknaðarføring og kundarøkt - Planlegging og tíðarætlan |
| **Tíðarskeið** | Mikudag 22. og hósdag 23. september<br>Mikudag 20. og hósdag 21. oktober<br>Mikudag 24. og hósdag 25. november |
| **Tíð** | 6 dagar á 8 tímar, kl. 09.00-16.00 í alt 48 tímar |
| **Stað** | Skúlaheimið, Tekniski Skúlin, Tórshavn |
| **Skeiðleiðsla** | Eirik Suni Danielsen, Jákup Mørkøre og Finn Jensen |
| **Kostnaður** | 7.500,- kr. íroknað frálærutilfar og mat |
| **Tilmelding** | Innan 8. september 2004 |

**Tilmelding á www.skeidsdepilin.fo ella við at ringja á tel 31 88 13**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeiðdsdepilin.fo

team85 358000

---

# ÚTSØLA

ÚTSØLAN BYRJAR
MÁNAMORGUNIN
30. AUGUST
KL. 10.00

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

---

www.sosialurin.fo

---

MIÐVÁGS KOMMUNA

## Umsjónarmaður

Søkt verður hervið eftir umsjónarmanni til kommunalar bygningar v.m. í Miðvágs kommunu at byrja 1. oktober 2004 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 332429 ella borgarstjóran tlf. 221429.

Umsóknir vera, saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvágur í seinasta lagi 16. september 2004 kl. 15.00.

Bygdaráðið skilar sær rætt til, um ikki nøktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.

**Miðvágs kommuna**

---

**M/S "VARÐIN" TIL SØLU**
**Uttan fiskiloyvir**



*Um hóskandi boð fæst, verður trolbáturin "Varðin" seldur uttan fiskiloyvir.*

*Báturin er í sera góðum standi og hevur góða útgerð á brúnni. Hevur M.A.N. høvuðsmaskinu frá 1999.*
*Áhugaði verða biðin um at venda sær til Tor Shipping á telefon 35 85 31 ella á 21 85 31 & 21 85 32.*

**TOR SHIPPING**
**Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn**
e-mail: torship@post.olivant.fo www.torship.com

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo